

*Íslendingar skulu á val komandi leygardag. Eitt av valevnunum er* ***Katrín Jakobsdóttir, sum er næstformaður í Vinstra-grøna flokkinum***

*Mynd: Carl Jóhan Jensen*

tey eru nú mong, ið setast niður her í longri tíðarskeið, eitt nú fólk, sum fær arbeiði í tænastuvinnu her í høvuðsstaðarøkinum.

*Hava myndugleikarnir nakran politikk á útlendingaøkinum yvirhøvur?*

- EBS-sáttmálin ásetur, at fólk frítt kann flyta millum ES og EBS-lond. Serliga eru nógvir póllendingar komnir higar undanfarin ár, men eisini fólk úr øðrum ES-londum. Reglur eru sjálvandi í gildi um hesi viðurskiftini, tær eru ásettar í sambandi við EBS-sáttmálan, men útlendingar hava kortini ikki altíð fingið ta móttøku her, sum teir áttu, og lítið hevur verið hugsað um, hvussu tey kunnu laga seg til íslendsk viðurskifti. Stjórnin legði herfyri fram ein politikk á økinum, men hann var ikki betur útgreindur enn so, at hann lættliga rúmdist einari blaðsíðu. Hinvegin er eitt Aljóðahús her í Reykjavík, sum tað almenna stendur fyri. Hagar kunnu innflytarar fara at biðja um hjálp og vegleiðing. Hetta tiltakið hevur roynst væl. Vit í Vinstri-grøna flokkinum hava lagt fleiri uppskot fram á ting um ábøtur eitt nú viðvíkjandi móttøku og málundirvísing. Vit hava eisini mælt til, at fólk, sum kemur til landið við ávísari útbúgving (t.d. sum handverkarar, maskinmeistarar el. a.) kann taka sonevnt javngildisprógv og fáa útbúgving sína metna. Sum nú er vera útlendskar útbúgvingar oftani als ikki góðtiknar.

## ES og Ísland

*Frá útlendingum til ES-spurningin. Eru tit heilt ímóti at taka upp samráðingar við ES um íslendskan limaskap?*

- Vit halda ikki at tíðin er búgvin at fara undir slíkar samráðingar. Evropa-nevndin, sum forsætisráðharrin setti í 2004 og eg sjálv sæt í, læt eina frágreiðing úr hondum herfyri. Í nevndini komu vit til ta niðurstøðu, at íslendingar høvdu nógvar, enn ónýttar møguleikar at økja um samskifti við og røkja síni áhugamál betur í mun til ES, uttan endiliga at noyðast uppí samveldið. Um ES-málið er semja millum okkum í Vinstri-grøna flokkinum og Sjálfstæðisflokkinn. Helst einasta mál, sum vit hava funnið fulla semju um við tann flokkin. Einasti flokkur, ið bartút segði, at hann er fyri íslendskum ES-limaskapi er Samfylkingin. Hinir báðir flokkarnir, Framsóknarflokkurinn og Frjálslyndi flokkurinn, drógu eitt sindur á bæði, hildu tað ikki vera ráðiligt fara upp í sum er, men vildu líkasum hava hetta opið.

*Hvørjar eru høvuðsgrundgevingar hjá tykkum fyri at vera ímóti ES-limaskapi?*

- Tær eru tvíbýttar. Øðrumegin er tað Evropasamaveldið per se, ivin um hvussu væl samveldið í royndum virkar fólkaræðisliga. Ávirkan okkara, gjørdist Ísland limur, hevði verið fimm tingmenn í einum tingi við sjeyhundrað limum. Hóast vit høvdu samstarvað við onnur norðurlond í politiskum bólkum, so hevði ávirkan okkara verður lítil sum eingin fólkaræðisliga. Bygnaðurin í samveldinum er heldur ikki serliga demokratiskur.

*Við øðrum tann partvísi fullveldismissurin, sum limaskapur hevði havt við sær, vigar ikki uppímóti fyrimununum?*

- Nei. Men vil ein meiriluti hinvegin lata fullveldi frá sær til Brússel, so er tað sum so í lagi, men fyrr enn ikki noyðast fólk at gera sær greitt, hvat tað merkir at lata fullveldi av hendi. Harafturat er heldur ikki komið rættiliga í ljós enn, hvørjar partar samveldið fer at taka fyri seg í framtíðini. Stjórnarskipanin, sum var feld fyri smáum tveimum árum síðani, legði upp til eitt nógv tættari samband millum londini enn tað, sum nú er, og hevði uttan iva gjørt samveldið líkari einum ríki enn einum felagskapi av ríkjum. Og hatta er ein gongd, sum ikki hugar okkum.

*Tú segði grundgevingar verða í tveimum. Hvørjar eru hinar?*

- Tær víkja fyrst og fremst at fiskivinnuni. Nógv kjak hevur verið um fiskivinnuna í sambandi við ES-spurningin. Men greitt er í fyrsta lagi, at gjørdist Ísland limur, høvdu íslendingar noyðst at fylgt felags fiskivinnupolitikkinum hjá ES. Í øðrum lagi er eingin trygd fyri, at íslendingar høvdu sloppið at veitt einsamallir í íslendskum sjógvi. Tað stendur til ES-nevndina at áseta kvotur í hvørjum føri. Íslendingar hava eyðvitað søgulig rættindi og høvdu tískil kanska fingið bróðurpartin av kvotunum við Ísland. Men kortini. Í triðja lagi eru tað hesir stovnarnir, sum ferðast ímillum, svartkjaftur t.d., og har høvdu vit, viðvíkjandi teimum stovnunum, verið bundin á bás av felags fiskivinnupolitikkinum bæði so og so.

Harafturat koma so aðrar avmarkingar, eitt nú tann at vit ikki longur høvdu kunnað gjørt fríhandilssáttmálar við onnur lond eins og teir, ið vit nú hava gjørt við Kina og USA og onnur lond.

*Men tá ið tú sigur, at tíðin ikki er búgvin nú til at taka upp samráðingar um ES-limaskap, liggur so í tí, at flokkur tykkara ikki útihýsir heilt, at ES-limaskapur kann vera ein møguleiki í framtíðini?*

- Tað ber sjálvandi ikki til at útihýsa tí heldur enn øðrum fyri alla framtíð. Einki bendir hinvegin á, at nakað víðari hendir í hasum spurninginum í komandi valskeiði. ES hevur heldur ikki verið nógv frammi í orðaskiftinum, síðani valstríðið byrjaði. Sjálv havi eg eisini ansað eftir, at áhugin fyri evninum er lítil sum eingin millum fólk. Á almennum fundum verður so at siga ikki spurt um ES. Vanlig fólk hugsa fyrst og fremst um vælferðina og gerandiskor síni. Og stúra annars fyri umhvørvi og náttúru.